11 bygdaráðslimir og ein borgarstjóri

Tað eru tær seks kommununrnar í Hósvík, Hvalvík, Haldarsvík, Gjógv, Saksun og Sunda, sum arbeiða við at leggja saman.

Fyri kortum setti bygdaráðini ein arbeiðsbólk at útgreina fyrimunir og vansar við samanleggingini.

Hesa vikuna eru borgarafundir í teimum seks kommununum um samanlegging og seinni verður ein felags borgarafundur, hann verður 29. apríl.

Og 6. mai er ætlanin at hava fólkaatkvøðu í teimum seks kommununum um samanlegging.

Treytin fyri samanlegging er, at meiri enn 50% í hvørjari kommunu sær skulu atkvøða fyri samanlegging.

Men harumframt skulu meiri enn 70% av øllum teimum, sum tilsamans hava vælrætt í hesum kommununum, atkvøða fyri samanlegging.

Siga vit, at tilsamans hava 1000 hava valrætt í hesum seks kommununum, skulu sostatt minst 700 atkvøður vera fyri samanlegging í teimum seks kommununum tilsamans.

Sostatt kemur atkvøðugreiðslan í Sunda Kommunu at vera rættiliga avgerðandi, tí har búgva nógv mest fólk.

Men tað merkir eisini, at verður treytin um tey 70% uppfylt, men at fólkið í onkrari einstakari kommuna atkvøður ímóti, fara hinar kommunurnar at leggja saman og so verður hendan eina uttanfyri.

Í løtuni eru 26 bygdasráðslimir og seks borgarstjórar í hesum kommununum. Leggja tær saman, verða 11 bygdaráðslimir og ein borgarstjóri í kommunustýrinum.

Taka bygdirnar undir við samanleggingini, verða tær ein kommuna frá 1. januar 2005 at rokna.

Nýggja kommunan skal eita Sunda Kommuna, tí tað er eitt óheft navn, sum ikki er staðbundið at nakrari kommunu.

Verða kommunurnar lagdar saman, verður umsitingin hjá nýggju stórkommununi á Oyrabakka. Tilsamans 1500 fólk búgva í teimum kommununum, sum arbeiða við at leggja saman.

Vita hvat tey hava og ivast í hvat tey fáa

Eftir borgarafundinum týskvøldið í Hvalvík at døma, er tað helvt um helvt, hvat fólk halda um kommunusamanlegging

KOMMUNUSAMANLEGGING
Áki Bertholdsen



– Fólk vita, hvat tey hava, men tey vita ikki, hvat tey fáa.

Í Hvalvík draga fólk í bæði borð, nú tey skulu taka støðu til at leggja saman við fimm øðrum kommunum í økinum.

Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Hvalvík sigur, at eini 130 fólk høvdu leitað sær á borgarafund týskvøldið og tað er helminguring av teimum, sum hava valrætt.

Og hann metir, at helvtin av teimum var fyri at leggja samn og hin helvtin var ímóti.

– Men tað var ein góður fundur, har fundarfólkini vóru dúglig at seta spurningar.

– Tað er týðiligt, at fólk eru eitt sindur ivingarsom. Tey vita, at tey hava eina kommunu, sum er hampiliga væl fyri og nú vilja tey hava at vita, hvørjir fyrimunir eru við at leggja saman.

Sjálvur ivast hann ikki í, at tað verður ein stórur fyrimunur at leggja saman.

Ætlanin er at hava fólkaatkvøðu 6. mai, men tað eru summi, sum halda, at tað er ov tíðliga.

– Tað taka vit nú til umhugsunar og eg tori ikki at siga um tað verður broytt. Fyrimunurin við at hava tað tíðliga í mai, er, at tá er summarfrítíðin ikki byrjað. Dregur út, er tað kanska rættast at bíða til í heyst, tá ið summarfrítíðin er av.

Sjálvur ivast Heðin Zachariasen ikki í, at tað er ein fyrimunur at leggja saman.

– Eitt nú heldur hann, at tá fer tað at bera nógv betri til at samskipa útbyggingar, fyri at sleppa undan at fleiri grannakommunur ikki gera sama slag útbyggingar.

– Ein vansi við samanlegging kann vera, at skattakrónur hjá bygdarfólki í einari bygd, verða brúktir í eini aðrari bygd. Men tað kann eisini virka beint øvugt, at tað ávís ár verða drignir nógv meiri peningur til eina bygd til ymsar útbyggingar, enn tað hevði borið til, bara við skattakrónunum frá bygdarfólkinum.

Ein vansi verður eisini, at umsitingin verður flutt eitt sindur longri burtur frá borgarunum. Men afturfyri verður kommunuskrivstovan opin allan dagin og ikki sum nú, bert nakrar fáar tímar.

Ein annar vansi kann eisini vera, at verður lagt saman, vendst ikki aftur. Men samanlangt heldur hann, at tað verður stórur fyrimunur.

Summi eru fyri og onnur eru ímóti

Eisini við Gjógv var lívligur fundur um samanlegging og eisini har draga tey í bæði borð

KOMMUNUSAMANLEGGING
Áki Bertholdsen

Eisini við Gjógv dregur bygdarfólkið í bæði borð, nú tey hittust týskvøldið at tosa um kommunusamanlegging.

Sofus Johannesen, borgarstjóri, sigur, at tað var ein lívligur og drúgvur fundur, har fólk spurdi dúgliga.

Sjálvur veit hann ikki, hvat niðurstøðan á fundinum var, men summi vóru fyri og onnur vóru ímóti.

Sjálvur sigur Sofus Joensen, at tað verður neyðugt at leggja saman, ikki minst hjá eini lítlari kommunu.

– Við Gjógv eru 46% av fólkinum pensjónistar. Eini 40% eru ímillum 17 og 67 ár og av teimum eru fleiri upp ímóti teimum 67.

– Sum tað sær út í løtuni, broytist aldursbýtið alsamt til tað verra. Tað verða fleiri og fleiri pensjónistar og tí verða færri og færri inntøkur at fíggja almenna virksemi við Gjógv.

– Leggja vit saman við øðrum, fáa vit eitt natúrligari aldursbýti í allari kommununi og tað er neyðugt, serliga nú landið setir størri og størri krøv til kommunurnar.

Í sambandi við tey størri krøvini frá landinum til kommunurnar, er tað eisini neyðugt at styrkja kommunalu umsitingarnar og tað klárar ein lítil kommuna ikki.

Hann sigur, at hesar kommunurnar, sum arbeiða fyri at leggja saman, eru ikki so ólíkar í støðd við tað, at tað er ongin heilt stór kommuna.

– Tað er ein fyrimunur, tí her verður tað ongin kommuna, sum heilt verður slúkt av eini stórari kommunu. Við tað, at allar kommunurnar eru lutfalsliga líkar, fer tað ikki at skapa sørtri forstáilsi fyri trupulleikunum úti á smáplássunum, sigur Sofus Johannesen.

Eg havi tapt

– Eg noyðist at atkvøða fyri kommunusamanlegging, sigur Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík, sum ætlar at taka seg úr kommunupolitikki, tá ið hetta skeiðið er runnið

KOMMUNUSAMANLEGGING
Áki Bertholdsen

Eg hevði droymt um at tað skuldi bera til at varðveita gomlu kommunurnar, men tað ber ikki til og tí noyðist eg at atkvøða fyri kommunusamanlegging, sigur Jógvan Mørkøre í Hósvík

– Eg má bara viðurkenna, at eg havi tapt.

Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík, fer at atkvøða fyri kommunusamanlegging, tá ið fólkaatkvøða verður í næstum í seks kommunum í Norðstreymoy og Norðureystuoy um at leggja saman.

Jógvan Mørkøre hevur altíð verið ímóti kommunusamanlegging. Men hann sigur, at sum tíðirnar eru broyttar er onki at gera, uttan at leggja saman.

Men spurningurin er, um hósvíkingar eru samdir við honum.

Týskvøldið var borgarafundur í Hósvík, har borgarstjórin legði ætlaninar fram, sum seks bygdaráð í Norðurstreymoy og Norðureysturoy hava gjørt um at leggja kommunurnar saman.

Hesar seks kommunurnar settu nakað síðani ein arbeiðsbólk at gera eina meting av fyrimunum og vansum við kommunusamanlegging

Helvt um helvt

Jógvan Mørkøre sigur, at eini 80 vóru á fundi í Hósvík.

Hann sigur, at sum hann dugdi at meta av fundinum er Hósvík at kalla farið í tvíningar, tí hann heldur at umleið helvtin av fundarfólkinum, var fyri at leggja saman og hin helvtin var ímóti.

Sjálvur heldur Jógvan Mørkøre, at tað einasta rætta er at leggja saman.

– Kommunuálitið hevur til endamáls at fáa kommunur at leggja saman og tað sær út sum um landsstýrið fylgir tí álitinum nágreiniliga.

– Eitt nú er ætlanin at leggja nógv øki undir kommunurnar at umsita, sum Landið nú umsitur.

– Eg havi altíð verið ímóti at leggja saman. Eg havi altíð sæð fyri mær, at kommunurnar kundu samstarvs um tey øki, sum skulu leggjast undir kommunurnar, men at gamla mynstrið við smærri kommunum, við hvør sínum bygdaráð, kundi varðveitast.

– Men tað ber ikki til. Tí havi eg broytt meining og sostatt fari eg at atkvøða fyri kommunusamanlegging, sigur Jógvan Mørkøre.

– Tað er ikki fýri megt sjálvan, at eg havi skift støðu. Tað er fyri framtíðina og tey, sum yngru eru. Tað nyttar ikki at siga nei, bara fyri at vera tvørur.

Jógvan Mørkøre sigur annars, at í løtuni hevur hann gjørt upp við seg sjálvan, at hann gevst í kommunupolitikki, tá ið hetta skeiðið er runnið.

– Eg havi sitið tríggjar setir. Skal eg stilla uppaftur, skal eg fáa rættiliga sterkar áheitanir um tað, leggur hann afturat.

Menninir handan Trøllapætur-filmarnar hava nú bert eina forðing eftir til at ein føroyskur barnabiograffilmur gerst veruleiki. Vónirnar eru góðar, og samstarvað verður við viðurkend filmsfeløg í Danmark, sum eru Zentropa og Nordisk Film

Tilgjørd mynd

Føroyski barnafilmurin:

Ein forðing eftir

Um alt gongur, sum fyrireikararnir ynskja tað, so verður skjótt ein føroyskur barnabiograffilmur veruleiki. Niklas Heri Jákupson, Steintór Rasmussen og Jógvan Eliasen hava nú fingið avtalu í lag við donsku filmsfeløgini Zentropa og Nordisk Film um ein barnafilm, og stuðla bæði feløgini verkætlanini fult og heilt

BARNAFILMUR
Ingrid Bjarnastein

Nú vantar ikki nógv í. Føroyski barnafilmurin, sum hevur verið at hoyra um fyrr, er nú væl á veg, og manglar nú bara tann seinasta forðingin í at sleppa inn í stóra danska filmsheimin.

Niklas Heri Jákupsson, Steintór Rasmussen og Jógvan Eliasen, sum eru menninir aftanfyri Trøllapætur filmarnar, hava nú í eini tvey ár arbeitt við eini verkætlan um ein føroyskan barnafilm. Og talan er ikki bara um ein og hvønn barnafilm. Hetta skal nevniliga vera ein barnafilmur, sum skal sýnast fram í biografum í øllum Norðanlondum.

– Vit hava nú í langa tíð sent teldupostar og faks aftur og fram, og nú er okkara søga góðkend av Zentropa og Nordisk Film, sum eru tvey av teimum størstu filmsfeløgunum í Danmark, sigur Niklas heri Jákupsson, sum er ein av teimum trimum, sum standa aftanfyri føroyska barnafilmin.

Tveir handritahøvundar eru nú settir av at arbeiða við søguni, og í mai mánaði koma teir upp til Føroya at skriva søguna um til eitt handrit, so ein filmur kann gerast burturúr tí. Talan er ikki bara um tveir heilt tilvildarligar handritahøvundar. Ulrik Breuning frá Nordisk Film og Hans Hansen frá Zentropa koma til Føroya. Teir eru báðir bæði kendir og viðurkendir handritahøvundar í danska filmsheiminum.

Milliónir

Niklas Heri Jákupsson dylir ikki fyri, at nógvar forðingar hava verið á vegnum. Arbeitt hevur verið við verkætlanini leingi, og nú tykist endiliga eitt ljós at vera fyri framman. Men enn er tann størsta forðingin eftir, og eitur hon Dansk Filminstitut.

– Um Dansk Filminstitut trýr uppá søguna, so verður filmurin til veruleika, tí tað verða teir, sum koma at spýta mest av pengum í. Um teir ikki trúgva uppá tað, so verður tað av ongum, sigur Niklas Heri, sum tó er rættiliga positivur.

– Zentropa og Nordisk Film eru tvey av teimum størstu filmsfeløgunum í Danmark og Hans Hansen og Ulrik Breuning eru tveir tungir dreingir innan danska filmsheimin, og tað ger, at vit hava góðar vónir.

Um filmurin gerst til veruleika, so kemur hetta ikki at vera heilt biligt. Talan er jú um ein biograffilmur, sum tó er ein barnafilmur, og sigur Niklas Heri, at øll tala og allur filmurin fer at ganga fyri seg í Føroyum og á føroyskum. Og verður filmurin til veruleika skal hann vísast í biografum í øllum Norðanlondum. Neyvu upphæddina er ilt at koma við beint nú, men talan verður uttan iva um nógvar milliónir krónur.

– Vit hava arbeitt leingi við hesi verkætlanini, og nú bíða vit bara eftir svari frá Dansk Filminstitut. Útmeldingarnar frá Zentropa og Nordisk Film eru eisini greiðar, teir eru við allan vegin, og vit eru so at siga lidnir við okkara part her í Føroyum, greiðir Niklas Heri frá.

Hvussu er og ikki verður helst ikki greitt fyrr enn einaferð í juli mánaði, men bíða stigtakararnir í spenningi eftir svari frá Dansk Filminstitut. Og verður filmurin til nakað, so verður hetta eitt mergmartak fyri allan tann føroyska filmsheimin.

Prix bólkar sent skriv

Ósemjan sum kom millum fyrireikararnar av Prix Føroyum og luttakandi finalu bólkarnar er meira ella minni endað. Bólkarnir hava sent fyrireikarunum skriv, har teir mótmæla framferðarháttinum, men teir fara ikki at boykotta finaluna, sum talan hevur verið um

PRIX FØROYAR
Ingrid Bjarnastein

Fyri stuttum kom ósemja í millum fyrireikararnar av Føroya størsta tónleikatiltakið, Prix Føroyar, og luttakandi finalubólkarnar.

Fyrireikararnir gjørdu herfyri greitt, at hyggjararnir eisini sleppa at siga sína meining, og hetta dámdu finalistunum lítið og einki.

Men herfyri var semja gjørd millum partarnar báðar, sum allir finalubólkar og fyrireikarar hava góðtikið. Hetta vil tó ikki siga, at bólkarnir halda, at framferðarhátturin hevur verið tann rætti. Herfyri varð skriv sent til fyrireikararnar av Prix Føroyum, sum ljóðaði soleiðis:

»Teir bólkarnir, ið skulu spæla á finaluni, vera sum ætlað á pallinum í Norðurlandahúsinum tann 26. apríl.

Ósemjan, ið fyri stuttari viku síðan kom í millum fyrireikarar og tónleikarar, er ikki av. Vit taka undir ongum umstøðum undir við tí framferðarhátti, ið fyrireikararnir sýndu okkum, tá ið broytt reglugerð, viðv. dømingini í finaluni, varð kunngjørd fyri okkum leygardagin tann 29. mars.

Tað er sera harmiligt, at tónleikararnir ikki vórðu kunnaðir og tiknir við uppá ráð, áðrenn samráðingarnar millum fyrireikararnar vórðu tiknar upp, og avgerðin varð tikin um at broyta nevndu reglugerð.

Hetta meta vit vera bæði niðrandi fyri tónleikararnar og tað, teir standa fyri. Og tískil eigur henda ábreiðsla at verða fyrireikarunum eitt fyridømi frameftir, soleiðis at allar reglur viðv. kappingini verða alment kunngjørdar, áðrenn bólkarnir melda seg til kappingina. So forðað verður fyri, at ávísar reglugerðir kunnu verða broyttar, uttan so at luttakandi partar eru samdir um tað. Niðanfyri nevndu bólkar hava avgjørt, at ósemjan tó ikki eigur at forða fyri einum framhaldandi og mennandi tónleikatiltaki, eins og Prix Føroyar er fyri føroyskt tónleikalív.

Bólkarnir, ið eru við í Prix Føroyar finaluni 2003, eru hesir:

Hatespeech, Deja Vu, MC Hár, Gestir, Braquet og Makrel.

Við vón um eina góða og spennandi finalu tann 26. apríl.«